# ÍSF tørvar eykajáttan á 800.000 krónur

**Ítróttarsambandi Føroya tørvar eina eykajáttan á 800.000 krónur beinanvegin, um flutningur av ítróttarfólki skal halda fram. Privatiseringin av bussleiðini hevur havt við sær, at eykabussar ikki verða settir í koyring, tá vanligi bussurin er fullur av fólki**

FLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*



*Fleiri ítróttarfeløg fingu ikki pláss í bussunum hjá Bygdaleiðum seinasta vikuskiftið, og tí blivu fleiri dystir avlýstir. ÍSF krevur eina eykajáttan á 800.000 krónur fyri at fáa glið á flutningin aftur*

Seinasta vikuskiftið boðaðu fleiri ítróttarfeløg kring landið frá, at tey ikki fóru at senda síni lið at spæla dystir og kappingar á uttanfyri heimbygdina. Enn er ógreitt, hvussu verður komandi vikuskiftið, tá dystir og kappingar aftur eru á skránni.

Orsøkin er, at einki pláss er í bussunum hjá bygdaleiðum, og aðrir bussar verða ikki settir í koyring fyri at nøkta tørvin. Henda støðan er íkomin, eftir at bygdaleiðir blivu privatiseraðar.

Nú eru tað teir einstøku bussførararnir, ið hava fingið rutuna at røkja, sum skulu taka avgerð um at seta fleiri bussar í koyring. Og teir seta ikki fleiri bussar í koyring uttan at vita, hvør skal gjalda fyri hetta.

ÍSF fór mikudagin seinnapartin á fund við nýggja landsstýrismannin við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, á Mentamálaráðnum at fáa greiðu á støðuni.

Um viðurskiftini ikki fáast uppá pláss, er vandi fyri, at kappingar verða niðurlagdar.

### Eykajáttan krevst

Játtanin á fíggjarlógini til flutning av ítróttarfólki er í ár 1,7 milliónir krónur. Tørvurin er í veruleikanum 3 milliónir krónur, og Heðin Mortensenm, forseti í ÍSF, væntar, at játtanin fer at nøkta tørvin komandi ár.

– Vit kunnu als ikki liva við hesi støðuni. Vit hava strongt á at fáa greiðu á viðurskiftunum, men einki er hent. Vit hava tørv á eini eykajáttan á 800.000 krónur, so klára vit at halda tørn restina av árinum, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at síðan bygdaleiðir vóru einskildar, hava ítróttarfeløg havt trupulleikar. Eykabussar eru ikki til tey fólkini, ið ikki fáa sess í vanliga bussinum. Tí verður tørvurin ikki nøktaður.

Og tað eru ikki bara ítróttarfólk, ið mugu svíða fyri hetta. Pensjónistafeløg og skúlaflokkar hava eisini avlýst sínar ferðir kring landið vegna plásstrot í bussunum.

Arbeitt verður eisini við eini nýggjari elektroniskari gjaldsskipan, men ÍSF vil als ikki taka undir við hesi skipan.

– Tann nýggja elektroniska gjaldsskipanin fer at geva nógv størri umsiting og fer at skapa órógv, sigur forsetin, sum heldur, at tey skulu halda fram við gomlu skipanini við teimum gulu seðlunum.

Heðin Mortensen er eisini misnøgdur við, at tey ferðandi bert fáa 15 prosent í avsláttri, tí fyrr var avsláttturin heili 40 prosent.

ÍSF ber eisini ótta fyri, at tey ungu skipa fyri sínum egna flutningi. Trygdin er ikki altíð í lagi, tá fleiri fólk kroysta seg inn í ein bil. Hesum er ÍSF harðliga ímóti og mælir frá, at fólk skipa fyri flutningi, har trygdin ikki er í lagi.




# U-17 hevur úttøkuvenjing

LANDSLIÐ
*Stefan í Skorini*

Venjarin hjá U-17 landsliðnum, Bill McLeod Jacobsen, hevur úttikið nakrar ungar leikarar, ið skulu møta til úttøkuvenjing í Havn sunnudagin 23. juni. Tilsamans 28 leikarar skulu møta til venjing, sum verður á Tórsvølli. Venjarin skal bara hava 18 leikarar við á ferðini, og tí skulu tíggju sáldast frá.

Venjarin sigur, at fyrireikingarnar hava verið nógv darvaðar av verkfallinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum. Ætlanin var at hava fleiri úttøkuvenjingar tá, sum tó vórðu avlýstar. Eisini hevur verkfallið við sær, at nógvir útsettir dystir skulu spælast nú, og tí eru leikararnir nógv upptiknir við dystum í feløgunum.

U-17 landsliðið skal til Svøríkis tann 28. juli. Føroyska liðið er í bólki við Englandi, Svørík og Noregi. Í hinum bólkinum eru Finnland, Danmark, Ísland og Slovakia.

Leikararnir eru hesir: Gunnar Nielsen, Svenn Dam Jacobsen, Emil N. Leifsson, Páll M. Joensen, Jónas Þór Næs, Jóhan E.R. Mouritsen, Tróndur Kragesteen, HB. Jústinus H. Hansen, NSÍ. Poul N. Poulsen, Hartman Hansen, Niklas Joensen, VB. Ovi Magnussen, Jóhan Petur Poulsen, B68. Sverri Jacobsen, Símun Louis Jacobsen, GÍ. Julian Samuelsen, Allan Tungá, Urbanus Olsen, Steffan Kalsø, KÍ. Bogi Hermansen, B36. Heini Kristiansen, Teitur Reinert Olsen, Borgar Kristiansen, Skála. Ragnar Mortensen, Búgvi Jógvansson, TB. Fritleif í Lambanum, ÍF. Andreas Lava Olsen, LÍF. Mikkjal T. Hentze, B71. Bill McLeod Jacobsen úr Klaksvík er venjari, og Pætur Clementsen úr Havn er hjálparvenjari.

# Fluttir dystir

Í dag, hósdagin 20. juni, verða tveir dystir í 1. deild hjá kvinnum leiktir. Kappingarstjórin hevur gjørt av at flyta hesar dystirnar frá øðrum leikdøgum.

Í Havn verður dystur millum kvinnuliðini hjá B36 og GÍ, og inni á Toftum spæla B68 og KÍ.

Í Havn er B36 stórfavorittur at vinna dystin. GÍ tapti seinasta dyst sín, sum var ímóti B68, 5-1 á heimavølli. B36 skal royna at halda tørn við KÍ í oddinum í 1. deild, og tí er kravið ein sigur.

Á Toftum verður spennandi dystur millum KÍ og B68, sum bæði liggja í oddinum í fremstu kvinnudeildini. KÍ er favorittur undan dystinum, sum tær altíð eru, men B68 liðið er altíð torført at basa á heimavølli.

Bilar
Nr. 115 • hósdagur • 20. juni 2002 • 76. árg.

# VR Bilar – stór útskifting av bussum í løtuni



*Tveir nýggir bussar – ein býbussur til Gunnleif Danielsen og bussur til Bygdaleiðir hjá Thórleif Isaksen. Á myndini eru frá vinstru: Gunnleif Danielsen, busseigari, Torleif Nón, verkførari hjá VR Bilum, Sverri Steintún, stjóri á VR Bilum, og Thórleif Isaksen, busseigari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í seinastu viku lótu VR Bilar, við Hoyvíksvegin, tveir nýggjar Volvo bussar. Annar var ein býbussur til Gunnleif Danielsen í Havn og hin var ein bussur til Bygdaleiðir hjá Thórleif Isaksen í Søldarfirði. Nógvir nýggir bussar eru á veg**

BUSSAR
*Magnus Gunnarsson*

Nú eru yvir 20 ár liðin síðan Bussleiðin í Havn og Bygdarleiðir fóru at virka. Tað at hesir bussar koyra í fastari rutu, tó á hvør sínum økjum, hevur broytt nógv innan samferðsluna í Føroyum. Hóast bussarnir halda leingi, er neyðugt at skifta teir út av og á, fyri at halda standardin á so høgum støði sum gjørligt. Bussar eru nógv broyttir hesi meira enn 20 árini. Tað síggja vit best á teimum nýggju framkomnu bussunum, har næstan alt er teldustýrt og verður stýrt við smáum joystickum, og teldur mugu brúkast fyri at finna mekanisk, elektrisk ella elektronisk brek.

### Uppbygdir í Danmark og Finnlandi

Býbussurin hjá Gunnleif Danielsen er uppbygdur í Aabenraa í Danmark. Hann er ein sokallaður "lav entré bussur", ið er sera væl egnaður til býkoyring. Motorurin er ein DH12D við 340 hk, við umhvørvisvinarligum CRT sótfiltri og heilautomatiskum girkassa við retardara. Bussurin, ið er luftavfjaðraður, kann lyftast upp ella senkast og knela á høgru síðu, soleiðis at trinbrettið er í somu hædd sum gongubreytin. Instrumentborðið kann lyftast upp og niður eftir ynski. Bussurin hevur eftirlitskamera og t.d. verða ljós, hurðar og hitin elektroniskt stýrd. Skivubremsur eru framman og aftan við EBS bremsuskipan.

Bygdaleiðirbussurin hjá Thórleif Isaksen, ið er uppbygdur hjá Kiitokori í Finnlandi, hevur eisini ein DH12D motor, men við 420 hk og 4 trins retardara, ið aktiverast við at sleppa spitaranum. Hann hevur eisini ABS bremsuskipan, fartpilot, antispinn og elektroniskt girskifti. Bussurin er uppbygdur sum ein touristbussur, t.v.s. at setrini kunnu leggjast niður, 2 sjónvarp við DVD-spælara, eisini sæst SVF. Øll setrini hava stikk til oyramikrofon og kunnu skifta millum sjónvarp og radio. Umframt bakkikamera eru eisini tvey eftirlitskamera.

# Nissan Terrano - nú við kvikum 3.0 litur motori

*Við 3.0 litur motorinum er Nissan Terrano sera kvikur og orkusparandi*



**Hóast Nissan Terrano sær út sum ein lættur frítíðar SUV, er hann ein ektaður jeepur. Bilurin, ið er bygdur yvir eina chassisrammu, fæst í tveimum støddum og aksilfrástøðum og við einum nýggjum kvikum 3.0 litur turbodieselmotori**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nissan Terrano er nakað broyttur í nýggjastu útgávuni. Koyrieginleikarnir eru munandi betraðir. Størra útgávan, við 5 hurðum, kann hava upp til 7 sitipláss, meðan útgávan við 3 hurðum er ein 5 persónabilur. Motorurin er 2.7 ella 3.0 litur turbodiesel við intercoolara. 3.0 litur 16V motorurin, ið er kvikur, kraftar væl og er lutfalsliga orkusparandi, fæst eisini við automatiskum girum. Til ber at skifta ímillum, so bilurin trekkjur á 2 ella 4 hjólum, eins og millum høg og lág gir. Terrano hevur ikki sjálvberandi karossarí, men er bygdur yvir eina chassisrammu, ið ger bilin stúttan at koyra við á vánaligum vegi ella har sum ongin koyrivegur er.

## Nissan Terrano 3.0 TDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 3.0 litur 4 syl. 154 hk<br>Turbodiesel v. intercoolara |
| 0-100 km/t | 13.5 sek |
| Oljunýtsla | 11,0 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 235/70-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 472,2 cm ella 424,2 cm<br>(styttra modellið) |
| Breidd | 175,5 cm |
| Hædd | 181,0 cm |
| Eginvekt | 1850 kg |
| Totalvekt | 2575 kg |
| Prísur | við 3.0 litur motori úr kr. 317.000,-<br>(sum vøruvognur kr.235.000,-) |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.nissan.fo |